

Mynd: BP

# 2016 gerst enn verri - oljuprísurin lækkar til 35 dollarar

**Jógvan Hugo Gardar**

22.11.2015 - 14:54

Oljan.fo

Amerikanska fyritøkan T. Rowe Price, ið er ein sokallaður umsitari innan olju og oljusølur, ivast ikki í at 2016 kemur at gerast eitt enn tyngri ár enn 2015 fyri kolvetnisvinnuna. Hetta skrivar Dagens Næringsliv.

Spádómurin hjá teimum er at oljuprísurin kemur at lækka, og ein skal rokna við einum oljuprísi sum kemur at iggja heilt niðri á 35 dollarum fyri fatið. Fyri vanliga brúkarin merkir hetta lægri oljuprísir, men fyri oljuvinnuna merkir hetta lægri yvirskot og at fleiri fyritøkur í oljuvinnuni fara á heysin